VIÐMERKINGAR

# Uppílegging neyðug

Nanna Skála

Tað er heilsuskaðiligt at roykja. Eingin ivi um ta. Men at tað er so hættisligt at vaksa upp í einum roykjaraheimi, sum nýggjastu kanningarnar vísa, kom óvart á sjálvt Ingu Haunstrup Clemensen, yvirlækni á Kræftens Bekæmpelse.

Ì tubbaksroyki eru fleiri enn 4000 evnafrøðilig evni, so sum gassir og ovurfínir bitlar. Hesar andar tú niður í teg, uttan mun til um tú er roykjari ella óbeinleiðis roykjari. Beint aftan á at roykt hevur verið innandura, ber til at síggja og lukta tubbaksroykin, men er eisini nógv, sum ein hvørki luktar ella sær. Hóast væl verður luftað út, so slepst ikki av við teir ósjónligu og luktleysu bitlarnar - eingin útlufting fær hesar til at hvørva.

Seinastu kanningarúrslitini vísa, at als eingin ivi longur er um, at royking og óbeinleiðis royking eru skaðilig fyri bæði børn og fostur. Tað er bæði ræðandi og harmiligt, at so nógv foreldur halda fram við at roykja. Men enn meira ræðandi kenni eg nýggju vitanina um, hvussu vandamikið tað er fyri børn at vaksa upp í einum heimi, har roykt verður, sigur Inge Haunstrup Clemensen.

Við nýggjum og øðrvísi kanningarhátti ber til at máta evnastyrkina av cotiini í likaminum. Cotiin er eitt sundurloysandi evni úr nikotini, og kann tað mátast í likaminum hjá roykjarum og hjá óbeinleiðis roykjarum. Cotiinmátingar eru í dag kanska mest álítandi hátturin at vísa á, hvussu nógvari óbeinleiðis royking ein persónur hevur verið fyri.

Framkomnir kanningarhættir hava til dømis víst, at tað er ikki nóg mikið at foreldrini fara útum at roykja, um tey ynskja at verja børn síni móti tubbaksroykinum. Mong av teimum skaðiligu evnunum, sum koma úr roykinum, seta seg í klæðini, og verða á tann hátt borin inn til børnini. Hetta merkir, at foreldur, ommur og abbar, sum roykja, í veruleikanum koma børnunum í vanda við at gera tey til óbeinleiðis roykjarar, sjálvt um tey roykja uttandura.

**Uppílegging neyðug**

Hví gevast foreldur ikki við at roykja, sjálvt um kanningar greitt hava skjalprógvað, hvussu skaðiligt og vandamikið tað er at vaksa upp sum óbeinleiðis roykjari.

Tað hevur óivað týdning, at tað í fleiri ættarlið hevur verið góðtikið sum nakað sjálvsagt at fólk roykja. Vit eiga heldur ikki at gloyma, hvussu torført tað er hjá nógvum at leggja av. Foreldur vilja vanliga børnunum alt tað besta, men er ein heftur at nokitini, kann vera torført at skilja ímillum vanafesti og fyrilit. Sum foreldur orkar tú ikki at hugsa um, at børnini kenna svian av vanafestinum. Flestu okkara megna at troka burtur alla vitan um skaðiligu árinini, tubbakkið hevur á ein sjálvan og umhvørvið, sigur Inge Haunstrup Clemensen.

Tí heldur yvirlæknin, at politisk uppílegging er bæði neyðug og jalig.

Sambært nýggjastu kanningarúrslitunum átti at verið bannað at roykt alla staðni, har børn koma. T.d. í dagrøktum, dagstovnum og skúlum. Tí eingin lægsta gátt er fyri teim skaðiligu árinunum av óbeinleiðis royking. Hóast útluftað verður í einum rúmi, har fólk hava roykt, verða bitlarnir liggjandi í dustinum á gólvinum og í húsbúnaðinum, og spreiðast teir haðani út í rúmið. Bitlarnir andast inn við dustinum, og fara teir so frá luftvegnum niður í lunguni. Har frá verða teir leiddir við blóðinum út í alt likamið, og volda ofta óbótaligan skaða.

Ein roynd hevur víst, at tað vóru 10 ferðir so nógvir fínir bitlar í afturlætnum rúmi, har tríggjar sigarettir høvdu roykt seg sjálvar upp, sum tá ein bilur við tendraðum dieselmotori hevði staðið í sama rúmi í hálvan tíma.

Nógv verður granskað í ovurfínum bitlum, tí illgruni er um, at teir eru vandamesti parturin av roykdálkanini. Teir eru so smáir, at teir kunnu fara úr andaleiðini yvir í blóðreinslið. Ì roykinum eru eini 4000 evni, og ymist er, hvørji teirra verða máld í teimum ynsu kanningunum. Tó er greitt, at bæði stakevni og heildarmongdin eru orsøk til andaleiðissjúkur, staðfestir Inge Haunstrup Clemensen. Og yvirlæknin heldur fram: »Um vit skunda undir lóggávuna við at banna royking á støðum, har børn koma, fara foreldur at skilja, at tað heldur ikki er so snilt at roykja heima við hús. Tað kann vera eitt stig fram á røttu kósina. Vit eru noydd at fara varliga til verka, tí sannleikin er so skelkandi, at hann kann ikki bara klamsast í høvdið á foreldrunum. Gera vit tað, kunnu vit rokna við, at nógv sýta at síggja veruleikan, sum hann er, og vilja tey tískil avsanna sannroyndirnar. Best er, um foreldrini sjálvi kenna á sær, at tey kunnu geva børnum sínum eina betri byrjan í lívinum og somuleiðis ein betri barndóm - hetta við ikki at roykja ella við at leggja av«, sigur Inge Haunstrup Clemensen, yvirlækni hjá Kræftens Bekæmpelse at enda.

*Leysliga umsett úr Helse fyri september 2005.*

# Man kan sige så meget om homoseksuelle

Michael Feldballe

Under første behandling af forslaget om udvidelse af straffelovens §266 b, har det været fremme fra kritikernes side at man, hvis forslaget vedtages, ikke længere kan udtale sig om biblens ord i, såvel som udenfor kirken. Dertil har det været udtalt at man, efter en vedtagelse af lovforslaget, lige så godt kan indfinde sig på Skansen, fordi man herefter ikke længere vil kunne udtale sig på sædvanlig vis.

For at tage det sidste først, er det til enhver tid muligt at lægge afstand til udtalelser, hvis de har en injurerende karakter og med den nuværende udformning af straffeloven, få prøvet påstanden om krænkelse. At en anden mand kan have svært ved at udtale sig diplomatisk, er det vel i sidste ende kun hans egen moral, der kan lægge ham til last.

Med det andet synspunkt skulle sagerne fremstå desto værre. Det ville jo ikke være godt, hvis man ikke længere kan forkynde biblens ord, uden at komme på kant med loven.

Hvis man kan og vil læse det bilag, der er vedlagt det fremsatte lovforslag, vil man bemærke at de forslagstillere, der i sin tid fremsatte forslaget om lovændring i 1987, gjorde sig tanker om den mulige konsekvens for ytringsfriheden. Det må i sidste ende være afgørende at man ikke giver køb på muligheden for den frie debat. Det er en væsentlig samfundsbærende faktor dengang som nu.

For nu at redde de kære kritikere på målstregen, således debatten om lovforslaget, ikke ender i en useriøse snak om, hvad præsten nu kan og må prædike, kan det være relevant at se på en domsafsigelse, der er vurderet på baggrund af den danske strafferets § 266 b.

Under debatten i Danmark vedrørende registreret partnerskab i 1989, udtalte en læserbrevsskribent sig i Kristeligt Dagblad i meget skarpe vendinger mod homoseksuelle. Læserbrevet var godt garneret med de velkendte citatsteder fra 3. mosebog. Skribenten blev anmeldt af Landsforeningen for Bøsser og Lesbiske og sagen blev behandlet ved både byretten i Skjern og ved Vestre Landsret. Skribenten blev frikendt ved begge retsinstanser. Af rettens bemærkninger til denne dom fremgår det at "homoseksualitet er i strid med biblens ord. Direkte citater fra biblen falder uden for straffelovens § 266 b. Det samme må efter rettens opfattelse gælde en nær gengivelse og udlægning af skriftsteder.

Flere af biblens skriftsteder indeholder en kraftig fordømmelse af homoseksuel adfærd". Envidere om ytringsfriheden vedrørende deltagelse i den offentlige debat udtales at "hensynet til ytringsfriheden må imidlertid efter rettens opfattelse føre til, at der ikke stilles så strenge krav til et læserbrevs saglige form, at man derved afholder almindelige mennesker fra at deltage i offentlige debatter". Begge citater er fra byrettens afgørelse.

Efter at dommen blev anket, knyttede Vestre Landsret følgende bemærkning til stadfæstelsen af dommen: "De udtalelser i tiltaltes læserbrev, der er omfattet af anklageskriftet må - også vurderet i sammenhæng med læserbrevets øvrige indhold - anses for at være en forhånelse og nedværdigelse af homoseksuelle personer, og disse voterende finder at tiltalte må have været klar over, at udtalelserne var af en sådan karakter. Udtalelserne kan ikke karakteriseres som mindre grove eller som værende fremsat som led i en saglig debat. Udtalelserne må derfor efter den afgrænsning af det strafbare område, som lovgiver - senest i 1987 - har foretaget overfor ytringsfriheden, karakteriseres som objektivt retsstridige. Herefter, og idet hensynet til at beskytte de homoseksuelle mod forhånende og nedværdigende udtalelser af den pågældende karakter vejer tungere end hensynet til, at sådanne udtalelser frit kan indgå i den åbne samfundsdebat, finder disse voterende tiltalte skyldig i overensstemmelse med den rejste tiltale. Det bemærkes, at tiltalte ikke herved findes at være afskåret fra på en saglig måde at deltage i samfundsdebatten".

Det vil, med tanke på det viste eksempel, ikke være umuligt for den ene eller anden part, at udtale sig mod homoseksualitet jvf. biblens ord. Det vil heller ikke være ulovligt for præsten af prædike. De påstande der er vendt mod lovforslaget om krænkelse af retten til at udtale sig med mishag mod homoseksuelle, er med dette eksempel det rene luft. Hvis det i denne type sager vil være som i så mange andre sager, at man orienterer sig efter danske domme, vil en tiltrængt udvidelse af § 266 b ikke give problemer for hverken præster eller politikere.

*Kilde: Vestre Landsret sag nr. U.1990.636V "Den ækleste form for hor".*

# Lygiprofetar í seyðaklæðum

Ebbedinna Jacobsen
*Kollafirði*

Jesus segði:

"Varðið tykkum fyri lygiprofetunum, sum koma til tykkara í seyðaklæðum, men eru glúpskir úlvar innan!" Matteus 7,15.

„Varðið tykkum fyri hinum skriftlærdu, sum fegin vilja ganga í síðum klæðum og verða heilsaðir á torgunum..." Mark 12,38

Jesus nýtir hetta líknilsið um tey síðu seyðaklæðini, tí Hann var jødi og visti, at seyðurin í Ísrael hevur so síða ull, at tá ið hann gongur, traðkar hann næstan í ullina. Hann kendi væl øll viðurskifti, og tí nýtti Hann hetta líknilsi um høvuðsprestarnar og fariseararnar, sum gingu í síðum klæðum og fingu Jesus dømdan til deyða við sviki.

Einaferð verður alt uppklárað - eisini tað svikið! Tá verður løn eftir dygd givin! Hon kemur eisini einaferð til teirra ella tey, bæði til hana og hansara, sum nærum traðka í prestakjólan!

"Tí Eg sigi tykkum: Er rættvísi tykkara ikki mætari enn rættvísi hinna skriftlærdu og Farisearanna, koma tit als ikki inn í ríki Himmiríkis." Matt. 5,20

"Ikki ein og hvør, sum sigur við Meg: „Harri, Harri!" skal koma inn í ríki Himmiríkis – nei, tann, ið ger vilja Faðirs Míns, sum er í Himli." Matt. 7,21

Men náði er fyri øll, so leingi lív er. Jesus vil frelsa øll, so leingi, sum vón er. Men deyðin ger skilnað. Tá verður ov seint!